# Flogfør á Netinum

**Á heimasíðuni hjá Vága Floghavn ber til at síggja myndir av flogførum, sum lenda á flogvøllinum í Vágum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Flogfør av nógvum ymsum sløgum lenda í Vágum millum ár og dag. Hetta hevði propell bæði aftan og framman*

*Mynd: Jákup Persson*

Ymisk eru flogførini, sum vitja flogvøllin í Vágum. Varaleiðarin á flogvøllinum plagar at taka myndir av teimum, og leggur regluliga út á Internetið.

Jákup Persson, varaleiðari á flogvøllinum í Vágum, sigur, at hann fór undir hetta ítriv fyri umleið einum ári síðan. Mestsum til stuttleika. Men tað hevur víst seg at hava áhuga ymsastaðni.

Tað kemur javnan fyri, at fólk ringir og spyr eftir myndum av ávísum flogførum, sum hava verið i Vágum. Ofta fólk, sum við privatflogfari hava verið framvið og vilja hava eitthvørt ferðaminni at vísa á.

–Tað eru summi, ið koma hendanveg, sum fegin vilja hava eitthvørt minni. So ein mynd, sum vísir, at flogfar teirra stendur á vøllinum, er altíð kærkomin, sigur Jákup Persson.

Sum rímiligt er, verða ikki øll flogfør, sum koma á vøllin, avmyndað. Tað er bara, um tað kemur eitt flogfar av slíkum slagi, sum ikki hevur verið fyrr, greiðir Jákup Persson frá.

Tað er hampiliga nógv ferðsla um flogvøllin í Vágum við smáum privatflogførum. Serliga um summarið.Tað eru fólk, sum hava ymisk ørindi, sigur Jákup Persson, varaleiðari á flogvøllinum i Vágum. Nógv millumlenda her á ferð víðari. Til Íslands fara nógv, og onkur fer so víðari. Onkur er bara og vendir, líkasum á eini útferð her norðanfyri, meðan upp aftur onnur beinleiðs koma til Føroya við egnum flogfari at halda frí. Okkurt flogfar hevur staðið upp í einar fimm dagar, meðan fólk hava ferðast í Føroyum, greiðir hann frá.

Jákup Persson greiðir frá, at hann herfyri tosaði við eini sveisisk hjún, sum steðgaðu á her á veg til Íslands við egnum flogfari. Tey greiddu frá, at tey fyri 30 árum síðan hittust í Íslandi, og vóru nú á veg hagar aftur fyri líkasum at minnast aftur á aftur. Á vegum vitjaðu tey so í Føroyum, sum tey annars ongantíð høvdu komið til, greiðir varaleiðarin hjá Statens Luftfartsvæsen í Vágum frá.

Til ber at síggja myndirnar av flogførunum við at fara á heimasíðuna www.slv.dk/vagar og síðan leita undir tíðindi.

## Heysttilboð frá Maersk Air



**Maersk Air boðar frá nýggjum tilboðum á flogrutunum millum Føroyar og Danmark**

FLOGFERÐSLA

Maersk Air fer í heyst at lata feðrafólki bíligari ferðaseðlar millum Føroyar og Danmark. Tilboðið er galdandi fram til hálvan oktober.

Í nýggja tilboðnum frá Maersk Air til føroysk flogferðafólk kostar ferðaseðilin til Keypmannahavnar kr. 2.165,- meðan kostnaðurin til Billund verður 2.203,-. Íroknað eru tá øll avgjøld.

Í samband við ferðing til og frá Billund er møguleiki fyri at flúgva viðari til Århus, Aalborg ella Odense. Tó móti eykagjaldi.

Maersk Air sigur i tíðindaskrivi, at galdandi er, at seinasta freist fyri at koma aftur til Føroya er 15. oktober. Ferðaseðlarnir skulu keypast minst sjey dagar, áðrenn fráferð, og teir verða ikki endurgoldnir. Í minsta lagi tvey fólk skulu vera i ferðalagnum. Annað kann vera barn millum tvey og ellivu ár. Galdandi er, at tey ferðandi eru burtur í hvussu er náttina millum leygardag og sunnudag, og ferðin kann í mesta lagi vara ein mánaða.

Ymiski barnafrádráttir verða givnir. Børn millum tvey og ellivu ár gjalda hálvan ferðaseðlaprís. Er barnið yngri enn eittt á og hevur egið setur, verður eisini hálvur prísur goldin, meðan barn undir eitt ár, sum ikki hevur egið setur, rindar 10% av ferðaseðlakostnaðinum, sigur Maersk Air í tíðindaskrivinum.

*ej*

## Við dupultari ferð til Gásadals

**Teir hava sett meira ferð á boringina í Gásadalstunlinum. Arbeitt verður nú í tveimum skiftum, og komið verður ígjøgnum fyri jól, sigur landsverkfrøðingurin**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

Tað gongur skjótt við boringini í Gásadalstunlinum. Ferðin er tvífaldað, síðan summarfrítíðin hjá landsverkfrøðinginum endaði, og komið verður ígjøgnum til jólar.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur sigur, at teir eru farnir undir at bora í tveimum vaktum í Gásadalstunlinum nú efitr summarfrítíðina.

Nú liðugt er at bora og gera vendipláss í Norðskálatunlinum, er manningin haðani farin vestur í Vágar at bora.

–Tað hevur alla tíðina verið liður í ætlanini, sigur Oyvindur Brimnes. Pengar eru settir av til boring í ár, og teir verða eisini brúktir, sigur hann.

Tá arbeitt verður við fullari styrki, og alt annars gongur væl, rokna teir við at kunna bora einar 50 metrar um vikuna, sigur landsverkfrøðingurin.

Hósdagin vóru teir komnir inn á júst 800 metrar, so einir 600 metrar eru eftir.

Tunnilin er fluttur nakað inn í landið i mun til fyrstu ætlanina. Tá var longdin sett til 1.700 metrar, men við flytingini er tunnilin styttur einar 300 metrar.

Fjallið er sera gott at bora ígjøgnum, sigur Oyvindur Brimnes. Fjallið er kanska enn betri, enn væntað var. Tað verður lítið at tryggja undir loftinum, og eisini er sera turt í tunlinum.

Gjørdar vórðu seismiskar kanningar og royndarboringar, sum gjørdu, at teir fluttu tunnilin. Teir vistu av, sigur landsverkfrøðingurin, at tað var gosmyrja einastaðni á vegnum, men hon vísti seg at vera undir tunnilslinjuni, og har eru teir komnir tvørtur um nú, so vónir eru fyri, at góða lendið fer at halda sær, til komið er ígjøgnum, sigur landsverkfrøðingurin.

Gásadalstunnilin verður líkur Kunoyartunlinum í hædd og breidd. Hálvtannað spor kalla teir hann, sigur landsverkfrøðingurin. Hann fær ikki ljós og telefonkaðalar, sum eitt nú Norðskálatunnilin nú fer at fáa, tí tey krøvini eru ikki sett til tunlar av tí slagnum, sum Gásadalstunnilin er, sigur Oyvindur Brimnes. Tað er ferðslan gjøgnum tunnilin, sum avger tað, sigur hann.



*Tá tunnilin er komin, verða túrarnir um Skarði færri*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Nú verður aftur dansað rúsfrítt

**Í vár byrjaði foreldrabólkurin aftanfyri Kom og dansa fyri ung upp á dans í Platform. Her skuldu tey ungu fáa høvi at dansa í einum rús- og roykfríum umhvørvi**

UNDIRHALD
*Ingrid Bjarnastein*



*Rús- og roykfríi dansurin í Platform byrjar nú aftur. Mánakvøldið verður dansað aftur fyri fyrstu ferð aftaná summarsteðgin*

*Savnsmynd*

Fyri at bøta um vánaligu dansiumstøðurnar hjá ungum í Tórshavn, tók foreldrabólkurin aftanfyri Kom og dansa fyri ung stig til at skipa fyri dansikvøldið í Platform mánakvøld einaferð um mánaðan.

Dentur verður lagdur á, at hesin dansur er bæði rús- og roykfríur, so tey ungu sleppa at uppliva eitt rúsfrítt umhvørvi.

Hetta tilboðið er ætlað ungum millum 13 og 17 ár. Tað vil siga, at hetta er til teirra, ið ganga í 7.- 10. flokki ella fyrsta ári á miðnámsskúlunum.

Nú hevur summarfrítíðin júst verið, og tí hevur ongin dansur verið á skránni, men nú verður byrjað aftur í stórum stíli.

Mánadagin 2. september verður aftur dansað í Platform. Byrjað verður klokkan 19.30, og dansað verður í tveir tímar. Dansifrøi hevur eisini verið við fyri at leggja lag á.

Foreldrabólkurin hevur eisini skipað fyri dansiskeiði, har undirvíst hevur verið í rock ´n roll, linjudansi og øðrum, og er tónleikastílurin sera fjølbroyttur. Alt frá diskotektónleiki til rock ´n roll verður spælt.

Byrjað varð uppá hetta tiltakið í mars mánaða, og síðani var Anna Kirstin av Tvøroyri og undirvísti í Losjuni í apríl mánaða. Skipað var tá eisini fyri breakdansi við kapping.

Fyri at vera við kostar tað 40 krónur, og tá er eisini møgligt at keypa sær okkurt leskiligt. Lýst verður hvørja ferð dansað verður í bløðunum. Eisini eru uppsløg á skúlum og ymsa aðrastaðni í Havn.

Í heyst verður eisini vitjan av íslendingum, sum fara at koma til Føroya at dansa.

Um tú hevur hug at vera við í rús- og roykfríum umhvørvi saman við øðrum ungum á tínum aldri, er at leita á fjórðu hædd í Havnar Klubba, har Platform liggur. Mánakvøldið verður fyrsti dansurin aftaná summarsteðgin.

# Føroyar og burðardygg menning

RÁÐSTEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

10 ár eru liðin síðani Agenda 21 og Rio Yvirlýsingin vórðu samtykt. Og í ár verður ein ST heimsráðstevna í Johannesburg í Suðurafrika um burðardygga menning.

Henda ráðstevnan verður í Suðurafrika frá 26. august – 4. september. Heitið á ráðstevnuni er formliga World Summit on Sustainable Developement, og hon verður hildin í sambandi við, at í ár eru 10 ár liðin síðani seinasta ST fundin.

Eisini umboð fyri Føroyar verða við á Johannesburg. Tað verða Eyðun Elttør, landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum, Hergeir Nielsen, formaður í løgtingsins uttanlandsnevnd og Kate Sanderson, fulltrúi á uttanríkisdeildini hjá Løgmansskrivstovuni.

HVÍTVØRU-TILBOÐ

**Míele microovnur**
M625 W. v/ Grill, klokku, digitalum timara og hyllasystemi. 1000 Watt
Vanl. prísur 5930,-
4.895,-

**Zanussi køliskáp**
ZT 155. 55 x 85 cm. Brutto 128 ltr. Netto 122 ltr.
Vanl. prísur 3290,-
2.595,-

**Creda kondens turkitrumla**
1 skoneprogram og 1 vanligt.
Vanl. prísur 5995,-
4.395,-

**Blomberg komfýrur**
Avmarkað nøgd
KNA 43. Keramik, luft, grill, yvir og undirvarma
Vanl. prísur 7995,-
6.995,-









**Blomberg eymhetta**
DZ 610. 3 trin regulering. Ljósrør. Sígur 310 m3
Vanl. prísur 1195,-
895,-



Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30